# Yvir tvey túsund færri akfør

Hagtøl fyri skráseting av akførum pr. 12. januar 2010 vísa, at talið av akførum er minkað við meira enn tvey túsund síðan í fjør. Í fjør vóru tilsamans 30.430 akfør í Føroyum í mun til 28.152 í ár. Í løtuni eru 19.671 persónbilar, 3.813 vørubilar og 588 lastbilar í landinum.



# Tema um bilar

Hósdagin verður tema-innslagið í morgunsendingini hjá Kringvarpinum um bilar, hvussu hesir hava ment seg seinastu 10 árini. Prátað verður við Magnus Gunnarsson, biláhugaðan blaðmann og útvarpsvert. Maggi hevur seinastu 10 árini skrivað um bilar í Sosialinum, eins og hann eisini hevur sína egnu útvarpssending „Bilradio" á Rás2.

# 40 dagar fongsul fyri harðskap

**Ein ungur maður varð í Føroya Rætti í morgun dømdur fyri álvarsligan harðskap; dómarin gav honum 40 dagar treytaleysa fongsulsrevsing**

HARÐSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Harðskapurin var so mikið grovur, at órættaði fekk vinstra lunga perforerað og endaði á intensivu deild á Landssjúkrahúsinum*

Tað var eitt februarkvøld í fjør, at illstøða stóðst millum tveir ungar mans. Hetta endaði alt í Føroya Rætti í dag við at annar maðurin varð dømdur fyri álvarsligan harðskap.

Tað var leygarkvøldið 21. februar í fjør, at teir báðir ungu menninir komu til ilnar. Upprunaliga varð ungi maðurin ákærdur eftir §245, ið er harðskapur av serliga ráum slag við nýtslu av onkrum amboði – knívi, fløsku, jarnstong og líknandi. Men eftir vitnisfrágreiðingarnar slepti ákæruvaldið hesa ákæruna og ákærdi mannin eftir teirri linari paragraffini 244.

Ákærdi viðgekk at hava sligið órættaða tvær ferðir við knýttum neva og sparka viðkomandi somuleiðis tvær ferðir.

Sum dokumentatión legði ákærin, Hanna Vang, fram læknafrágreiðing ið lýsti, at hann tvær ferðir var hjá órættaða, fyrru ferðina vísti hesin seg ikki at hava fingið serligt mein av viðferðini, men seinnu ferð var órættaði versnaður munandi, og hann varð tí sendur á skaðastovuna, har tað varð staðfest, at vinstra lunga var perforerað.

Órættaði endaði tískil á intensivu deild um náttina.

### Stranga revsing

Ákærin metti, at talan kundi ikki blíva um minni enn 30 daga fongsulsrevsing, og tá talan var um serliga grovan harðskap mælti hon til, at ákærdi varð dømdur 40 daga treytaleysa fongsulsrevsing.

Við í ákæruritinum var eisini ein ákæra um brot á fuglaveiðilógina við tað at ungi maðurin hevði skotið tvær villgæs, ið sum kunnugt eru friðaðar. Í tí førinum kravdi ákæruvaldið mannin dømda eina bót á 2000 krónur.

Verjin, Poul Hansen, kravdi í fyrsta lagi frídømming. Hann vísti á, at ákærdi ikki var revsaður áður, og at tað var órættaði, ið hevði provokerað ákærda og harvið var orsøkin til illstøðuna.

Í øðrum lagi metti verjin, at 30 dagar var ivaleysur dómur, og at hesin hartil átti at verða treytaður. Viðvíkjandi bótini vildi ákærdi taka við hesari.

Dómarin var tó av aðrari meining. Hann metti harðskapin so mikið grovan, at dómurin ljóðaði upp á 40 dagatreytaleysafongsulsrevsing. Hartil skal ákærdi rinda eina bót á 2000 krónur fyri at hava skotið tvær villgæs.

Ákærdi valdi ikki at kæra dómin inn fyri hægri rætt, men tók við dóminum.

# Jólini enda í dag



*Fram til í dag stendur jólatræið á Vaglinum uppi og lýsir upp í januarmyrkrinum*
*Mynd: Leo Poulsen*

**20. dag jóla var gamalt, at jólini endaðu, og tann siðin hevur kommunan í Tórshavn tikið upp**

JÓL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.go*

Ójavnt er, hvussu long jólini eru hjá fólki.

Í danska jólasanginum »Nu er det jul igen« verður sagt, at jólini vara til páska. Tað var so ikki vanligt í Føroyum, men at tey vara til 13. kvøld, sum er 6. januar, er vanligt. Ella til 20. kvøld jóla, sum er 13. januar, er eisini vanligt.

Ofta velja fólk at lata jólatræið enda í nýggjársbálinum, um enn tey bíða nakað við at taka annað jólapynt niður.

Í Havnar kommunu hava fólk undrast á, at jólatrø og ljósperur og jólapynt annars hongur uppi enn, men sambært borgarstjóranum er hetta gjørt við vilja.

- Vit hava valt at lata jólastásið verða hangandi uppi og jólatrøini standandi fram til 20. kvøld jóla. Hetta er jú myrkasta tíðin á árinum og veðrið er ofta ikki so upplyftandi, og tí hava vit hildið tað vera passandi, at lata jólastásið hugna um nakað longri enn vanligt, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann sigur, at arbeiðsfólkið hjá kommununi hevur fingið boð um at bíða við at taka jólastásið niður til í dag, so hetta verður við øðrum orðum seinasti dagur, at fólk í kommununi kunnu fegnast um jólastásið.

# Bilur rendi á stein

**Um 7.45-tíðina í morgun rullaði ein stórur steinur oman á Kaldbaksvegin, og í ringa sýninum rendi ein bilur á steinin**

FERÐSLUÓHAPP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Roknað verður við, at steinurin er loysnaður tá frostið er farið úr aftur jørðini, og hann rullaði so oman á Kaldbaksvegin.

Ein bilførari var so óheppin ikki at varnast steinin fyrr enn ov seint var og rendi tískil á hann. Eingin mannskaði stóðst av, men bilurin fór so mikið illa, at hann mátti sleipast á verkstað.

Løgreglan var á staðnum at syrgja fyri, at ikki fleiri bilar rendu á lutfalsliga stóra steinin.



*Sum myndin vísir fór bilurin rættiliga illa*
*Mynd: Jens Kristian Vang*